Eysturkommuna

# Fundarinnkalling

## Býráðið

**Dagfesting:** 30.04.2025 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir:
Per Martin Gregersen
Magnus Skoralíð
Hanna Jensen
Ann Fuglø
Heri Mikálsson
Pól í Skorini
Tórur Didrik Djurhuus
Unn Jarnskor Ellingsgaard
Uni Rasmussen


| Málsyvirlit | | | Síða |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 26/25 | 25/00230-1 | Innkalling av varalimi til býráðið - 25/00230 | 3 |
| 27/25 | 24/00300-2 | Víðkan av kirkjugarðinum í Norðragøtu Víðkan av kirkjugarðinum í Norðragøtu | 4 |
| 28/25 | 24/00492-4 | Broyting av býarplani í Norðragøtu - Øki H broytt til øki E -við kirkjugarðin | 6 |
| 29/25 | 24/00659-4 | Gøtu Húsasøga 2. Frágreiðing og tilmæli | 8 |
| 30/25 | 25/00143-2 | Umsókn til ummælis - Sundurbýti matr. nr. 30a Gøtugjógv - Umhvørvisstovan | 9 |
| 31/25 | 25/00147-3 | Brekkulegan 2025. Frágreiðing og tilmæli | 11 |
| 32/25 | 25/00173-2 | Umsókn um stuðul til matveiting - Verdandi. Frágreiðng og tilmæli | 12 |
| 33/25 | 25/00177-2 | Skótarnir Leirvíks Páll. Frágreiðing og tilmæli | 13 |
| 34/25 | 25/00180-2 | Losjan Glotti - nyggir stólar. Frágreiðing og tilmæli | 14 |
| 35/25 | 25/00184-2 | Tónleikasamtakið Grót. Frágreiðing og tilmæli | 15 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 36/25 | 25/00225-1 | Eykajáttan apríl 2025 - 25/00225 | 17 |
| 37/25 | 25/00227-1 | Broyting í almennu byggisamtyktini fyri øki D: Havnaøki | 18 |
| | | | |

**Til viðgerð:**

## 26/25 Innkalling av varalimi til býráðið - 25/00230

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.04.2025 | 26/25 | 25/00230-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Rebekka Jensen, sum er valt í býráið á lista O, hevur boðað frá at hon ikki kann røkja starvið til og við 1. august 2025. Næstvaldi á lista O er Tórur Didrik Djurhuus. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

## 27/25 Víðkan av kirkjugarðinum í Norðragøtu Víðkan av kirkjugarðinum í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.04.2024 | 13/24 | 24/00300-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 29.04.2024 | 15/24 | 24/00300-2 |
| 3 Býráðið | 02.05.2024 | 20/24 | 24/00300-2 |
| 4 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.04.2025 | 19/25 | 24/00300-2 |
| 5 Býráðið | 30.04.2025 | 27/25 | 24/00300-2 |
| 6 Fíggjarnevnd | 28.04.2025 | 16/25 | 24/00300-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Kirkjugarðurin í Norðragøtu er við at fyllast og tí er neyðugt at víðka um kirkjugarðin.<br><br>Í løtuni eru áleið 70 pláss tøk. Í Norðragøtu brúka vit millum 10 – 12 gravir um árið, tí er neyðugt at víðka um kirkjugarðin.<br><br>Lendi skal liggja í 3-5 ár áðrenn man kann gera gravir, og væntandi er at kirkjugarðurin er fullur um áleið 5 ár.<br><br>Umsitingin hevur gjørt uppskot til keyp av jørð, fyri at víðka um kirkjugarðin í Norðragøtu. Talan er um 2755 fermetrar og tað gevur pláss til 488 gravir. (Sí viðfest tekning)<br><br>Núverandi kirkjugarður bleiv seinast víðkaður síðst í 00´inum.<br><br>Umsitingin mælir til at keypa lendi.<br><br>**Ískoyti 24.04.2025**<br>Umsitingin hevur framhaldandi arbeitt við nevndu ætlan, og fundur hevur verið hildin við festaran.<br><br>Festarin hevur gjørt greitt, at hann ikki er sinnaður at lata ein so stóran part av økinum, sum upprunaliga ætlað. Hann er tó fúsur at góðtaka, at Eysturkommuna yvirtekur tann partin, sum liggur innan fyri verandi býarætlan, svarandi til umleið 1.636 fermetrar. Hetta er tó treytað av, at Eysturkommuna syrgir fyri, at vatnið verður leitt burtur av matr. nr. 25a.<br><br>Ein skrivlig avtala má fyriliggja millum Eysturkommunu og festarin um nevnda loysn.<br><br>Við yvirtøku av umleið 1.636 fermetrum fæst pláss fyri umleið 272 grøvum.<br><br>Sí kortskjal dagfest 11.04.2025. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.<br><br>**Ískoyti 24.04.2025**<br>Umsitingin mælir til, at gera skrivliga avtalu við festarin og at keypa lendi sum liggur innanfyri verandi býarætlan. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. april 2024**
Byggi- býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 29. apríl 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 02. mai 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 28/25 Broyting av býarplani í Norðragøtu - Øki H broytt til øki E -við kirkjugarðin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.08.2024 | 26/24 | 24/00492-4 |
| 2 Býráðið | 29.08.2024 | 41/24 | 24/00492-4 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.04.2025 | 20/25 | 24/00492-4 |
| 4 Býráðið | 30.04.2025 | 28/25 | 24/00492-4 |

**Málslýsing:**

Samband við ætlanin at víðka kirkjugarðin í Norðragøtu er tørvur á at broyta part av matr. nr. 25a frá "H. Frílendi" til "E, almennir stovnar"

Markeraða øki kortskjal "Kirkjugarður í NG – Broyting í býarætlanina (eftir broyting)" vísir øki ið fevnir um broytingina.

Umsitingin mælir til at taka undir við hesari broytingini.

**Ískoyti 24.04.2025**
Í samband við víðari arbeiði við hesum málinum, er ikki neyðugt at broyta býarætlanini fyri hetta økið.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar

**Tilmæli**

Mælt verður til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Ískoyti 24.04.2025**
Umsitingin mælir til ikki at broyta verandi býarætlanina.

### Byggi - og býarskipanarnevnd 22. august 2024
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

### Býráðið 29. august 2024
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini.

## 29/25 Gøtu Húsasøga 2. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.04.2025 | 9/25 | 24/00659-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2025 | 17/25 | 24/00659-4 |
| 3 Býráðið | 30.04.2025 | 29/25 | 24/00659-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umsókn um stuðul til tær tríggjar bøkurnar um Gøtu húsasøgu, partarnir um Syðrugøtu. Fyrsta bókin kom út í november 2024 og hinar báðar eru ætlaðar í november 2025 og mai 2026. Nógvar lokalar kreftir hava verið og eru partur av hesi verkætlan.<br><br>Fígging:<br>Løn til rithøvunda kr. 300.000<br>Uppseting og prent av bók 1, 2 og 3 kr. 400.000<br>Søla av bók 1, 2 og 3 kr. 350.000<br><br>Tørv á fígging kr. 350.000<br><br>Umbiðin upphædd: 175.000 kr. at lata í trimum reisum.<br>(Uppskot: des 24, aug 25, jan 26) |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan".<br>Herav eru per d.d. 600.000 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 07. april 2025**

Mentanarnevndin mælir til at stuðla umsóknini við 50.000 kr í hesum umfari. Støða verður tikin til restin av umsóknini í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2026.

## 30/25 Umsókn til ummælis - Sundurbýti matr. nr. 30a Gøtugjógv - Umhvørvisstovan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.03.2025 | 15/25 | 25/00143-2 |
| 2 Býráðið | 26.03.2025 | 21/25 | 25/00143-2 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.04.2025 | 21/25 | 25/00143-2 |
| 4 Býráðið | 30.04.2025 | 30/25 | 25/00143-2 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 10. mars 2025 frá Umhvørvisstovuni, har heitt verður á kommununa, at ummæla sundurbýti av matr. nr. 30a við Gøtugjógv, og at leggja part aftrat matr. nr. 2 við Gøtugjógv.

Ætlanin er, at sundurbýta matr. nr. 30a sambært viðfesta kortskjal "03 Tekning1" og at leggja part av matr. nr. 30a markeraðir við reyðum prikki á kortskjal "03 Tekning1" aftrat matr. nr. 2 við Gøtugjógv.

Sí annars viðfestu skjøl.

**Ískoyti 24.04.2025**
Í samband omanfyri nevnda sundurbýti, hevur Eysturkommuna ætlanir, at yvirtaka vegin sum liggur á matr. nr. 30a við Gøtugjógv. Vegurin á matr. nr 30a liggur sum privat ogn, ætlanin er at vegur verður lagdur saman við við matr. nr. c við Gøtugjógv.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at taka undir við ummælinum frá Umhvørvisstovuni.

**Ískoyti 24.04.2025**
Umsitingin mælir til, at taka undir við ummælinum frá Umhvørvisstovuni, treyta av, at vegurin á matr. nr. 30a við Gøtugjógv verður latin Eysturkommunu.

### Byggi - og býarskipanarnevnd 19. marts 2025
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 26. mars 2025**

Málið tikið av skrá

**Býráðið 26. mars 2025**

Málið tikið av skrá.

## 31/25 Brekkulegan 2025. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.04.2025 | 13/25 | 25/00147-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2025 | 18/25 | 25/00147-3 |
| 3 Býráðið | 30.04.2025 | 31/25 | 25/00147-3 |

**Málslýsing:**

Søkt verður um stuðul til Brekkuleguna 2025, ið verður hildin uppi á Brekkum í Leirvík 31. juli til 05. august.

Brekkulegan verður fyriskipað av Leirvíks Pálls skótunum, Føroya Skótaráð, Føroya Skótasambandi, KFUM Skótunum í Føroyum og Føroya KFUK Skótum, og Brekkulegan verður uttan samanbering største skótalega í Føroyum í hesari øldini. Fleiri enn 500 luttakarar hava teknað seg til leguna, har fleiri enn 300 teirra eru útlendingar. Rakstraræltanin, sum er viðheft, gevur í løtuni eitt lítið undirskot, og tí loyva vit okkum at koma við hesari stuðulsumsóknini.

Umbiðin upphædd: 100.000 kr.
Rakstrarætlan er viðfest málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan".
Herav eru per d.d. 600.000 kr. tøkar.

**Tilmæli**

Mælt verður til at ganga umsóknini partvíst á møti

**Mentanarnevndin 07. april 2025**

Mentanarnevndin mælir til at stuðla umsóknini við 70.000 kr.

## 32/25 Umsókn um stuðul til matveiting - Verdandi. Frágreiðng og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.04.2025 | 16/25 | 25/00173-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2025 | 19/25 | 25/00173-2 |
| 3 Býráðið | 30.04.2025 | 32/25 | 25/00173-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Filmsliðið Verdandi hevur spurt um møguleikarnar fyri víðari stuðul, har mítt uppskot er, at um stuðlast skal latast, kundi hetta verið til matveiting.<br>Verdandi fær brúk fyri matveiting 15 dagar, meðan tey filma í Eyk.<br><br>Prísur frá Bovling, Leirvík, uppá matveiting er 90 kr/pp per máltíð.<br><br>Samlaði prísurin verður: **104.000 kr.** fyri 34 máltíðir til 34 fólk.<br><br>Stuðul higartil:<br>100.000 kr. (vár 2023, stuðul til mentan/satspulja til filmsgerð)<br>100.000 kr. (vár 2024, stuðul til mentan) |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan".<br>Herav eru per d.d. 600.000 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at stuðla Verdandi soleiðis, at kommunan samskipar hesar máltíðar og betalir rokning frá Bovling |

### Mentanarnevndin 07. april 2025

Mentanarnevndin mælir til at stuðla umsóknini við 104.000 kr. sambært málslýsingini og at fíggjarnevndin finnur penganar á aðrari konto.

## 33/25 Skótarnir Leirvíks Páll. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.04.2025 | 18/25 | 25/00177-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2025 | 20/25 | 25/00177-2 |
| 3 Býráðið | 30.04.2025 | 33/25 | 25/00177-2 |

**Málslýsing:**

Stuðulin er ætlaður til daglian rakstur og íløgur í útgerð og húsið. Áleið 85 børn og ung eru virkin. Í ár eru 5 lið.

Ætlanin er at fara undir neystabygging til neystgrund, sum Eysturkommuna hevur latið. Neystið skal brúkast til at hýsa kano og annað skótavirksemið.
Í 2024 er nýggjur køkur settur upp í skóatahúsinum. Hesin kostaði góðar 60.000 kr.

Málið er at áhaldini viðlíkahalda ov betra um umstøðurnar hjá skótunum í kommunini. Skótarnir eru aktivir, teir hava eisini kano, sum teir javnan brúka.

Umbiðin upphædd: 60.000 kr.

2022: 60.000 kr.
2023: 40.000 kr.
2024: 50.000 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan".
Herav eru per d.d. 600.000 kr. tøkar.

**Tilmæli**

Mælt verður til at stuðla

**Mentanarnevndin 07. april 2025**
Mentanarnevndin mælir til at stuðla umsóknini við 50.000 kr.

## 34/25 Losjan Glotti - nyggir stólar. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.04.2025 | 19/25 | 25/00180-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2025 | 21/25 | 25/00180-2 |
| 3 Býráðið | 30.04.2025 | 34/25 | 25/00180-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Søkt verður um stuðul til rakstur og viðikahald av bygninginum, fyri at kunna røkja mentanar- og ungdómsarbeiði, ið eri húsinum. Nógv tiltøk eru í losjuni s.s. dansur, sjónleikur, borðspøl. Nógv í kommununi nýta húsini, bæði privatfólk og aðrir felagsskapir. Tey halda fundir, jólahugna, konfirmatión o.a. í húsunum og eisini kann man lána steintoy, borð og stólar til størri tiltøk.<br>Søkt verður um stuðul til:<br>at keypa nýggjar stólar, av tí at verandi stólar eru sera slitnir og illa farnir, og kunnu ikki bøtast meira.<br><br>Umbiðin upphædd: 100.000 kr.<br><br>2024: 30.000 kr.<br>2023: 40.000 kr.<br>2022: 40.000 kr.<br>2021: 20.000 kr. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, “Stuðul til mentan”.<br>Herav eru per d.d. 600.000 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita partvísan stuðul |

**Mentanarnevndin 07. april 2025**
Mentanarnevndin mælir til at stuðla umsóknini við 40.000 kr.

## 35/25 Tónleikasamtakið Grót. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.04.2025 | 22/25 | 25/00184-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.04.2025 | 22/25 | 25/00184-2 |
| 3 Býráðið | 30.04.2025 | 35/25 | 25/00184-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Søkt verður um fíggjarligt ískoyti til tær føstu útreiðslurnar, sum Tónleikasamtakið Grót hevur av at húsast í Tøting í Syðrugøtu.<br><br>Av tí, at Tónleikasamtakið ikki fekk stuðul frá Eysturkommunu í 2024, fara vit at søkja fyri 2024 og 2025. (Astrid: Ongin umsókn var innsend fyri 2024)<br><br>Tøting verður brúkt dagliga av nógvum ymiskum tónleikarum, tað hevur við sær eina stóra meirnýtslu av EL, meira slit av okkara útgerð, ið er sera kostnaðarmikil, og má tí javnan endurnýggjast.<br><br>Annars kann leggjast afturat, at Tónleikasamtakið Grót, skipar fyri umleið 30 konsertum árliga, tað svarar til umleið 15 tiltøk, við minnst tveimum bólkum hvørja fer. Í gjøgnumsnitt eru umleið 4 tónleikarar í hvørjum bólki, og tað svarar til uml. 120 tónleikarar árliga.<br>Felagsins virksemi er til gagns fyri føroykst tónleikalív, og soleiðis til gagns fyri okkum øll ið búgva her.<br>Tónleikasamtakið Grót er eitt áhugafelag, har alt virksemi hjá nevndini og hjálparfólki tess, er sjálvboði, ólønt arbeiði.<br><br>Umbiðin upphædd: 100.000 kr.<br><br>2024: -<br>2023: 40.000 kr.<br>2022: 50.000 kr.<br>2021: 40.000 kr. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, “Stuðul til mentan”.<br>Herav eru per d.d. 600.000 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita partvísan stuðul |

### Mentanarnevndin 07. april 2025

Mentanarnevndin mælir til at stuðla umsóknini við 40.000 kr.

## 36/25 Eykajáttan apríl 2025 - 25/00225

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 28.04.2025 | 23/25 | 25/00225-1 |
| 2 Býráðið | 30.04.2025 | 36/25 | 25/00225-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi yvirlit yvir eykajáttanir. Íalt er talan um eykajáttanir á 8.630.000,00 kr. harav 6.180.000,00 kr. eru íløgur sum verða fluttar frá 2024 til 2025.<br><br>Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 30 mió. settar av út- og umbygging av skúlanum í Leirvík. Hendan játtanin verður ikki øll brúkt og tí kunnu eykajáttaninar fíggjast av hesi konto. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Um eykajáttaninar verða fíggjaðar soleiðis sum tilmælt verður, hevur hetta ikki nakrar aðrar fíggjarlagar avleiðingar enn at løgujáttanin til skúlan í Leirvík minkar, og aðrar játtanir hækka. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajátttanir samb. fyriliggjandi yvirliti, og at peningurin verður tikin av konto 4.23.22.511-(Fólkaskúlin) |

## 37/25 Broyting í almennu byggisamtyktini fyri øki D: Havnaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 22.04.2025 | 2/25 | 25/00227-1 |
| 2 Býráðið | 30.04.2025 | 37/25 | 25/00227-1 |

**Málslýsing:**

Ætlanin er, at gera broyta almennu byggisamtyktin fyri øki D: Havnaøki hjá Eysturkommunu.

Verandi byggisamtykt er soljóðandi:

### § 10. Ásetingar fyri øki D: Havnaøki.

1. Økið verður lagt av til havnaendamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við

2. Byggistigið fyri havnaøki sum heild má ikki fara upp um 0,3

3. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu verða hægri enn 8m yvir miðaljørðildi (miðal við húsahornini).

4. Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 10m ella nærri aðrari bygging enn 5m.

Ætlaða broytingin fevnir um punkt 5 og 6, sum verða lagdar aftrat.

1. Økið verður lagt av til havnaendamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við hesi.
2. Byggistigið fyri havnaøki sum heild má ikki fara upp um 0,3
3. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu verða hægri enn 8m yvir miðaljørðildi (miðal við húsahornini).
4. Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 10m ella nærri aðrari bygging enn 5m.
5. *Loyvi kann gevast til at gera goymslutunnlar inn í fjallið.*
6. *Býraðið hevur heimild til at gera, ella geva loyvi til, útfyllingar út á sjógv innanfyri tað økið sum er lagt út sum havnaøkið á plankortinum.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at taka undir við broytingunum.

**Vinnunevndin 22. april 2025**

Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

fundurin lokin

Per Martin Gregersen

Magnus Skoralíð

Hanna Jensen

Ann Fuglø

Heri Mikálsson

Pól í Skorini

Rebekka Jensen

Unn Jarnskor
Ellingsgaard

Uni Rasmussen